# Tómu kirkjurnar skulu fyllast



*Tær tómu kirkjurnar skulu brúkast bæði til kirkjulig og mentanarlig endamál*

**Tómu kirkjurnar í Danmark skulu í framtíðini brúkast til bæði kirkjulig og mentunarlig endamál**

KIRKJUR

*Snorri Brend*

**Danmark:** - Hvat ger ein við eina kirkju, tá hon ikki longur verður brúkt til hámessur sunnudagar?

Henda spurningin fáa danskir arkitektar nú møguleikan at geva síni boð uppá, nú landsins fyrsta arkitektakapping um nýggja nýtslu av kirkjunum verður sett í gongd.

Kappingin snýr seg í stuttum um, hvat Gethsemane Kirke á Vesturbrúgv í Keypmannahavn skal brúkast til.

Kirkjan, sum er partur av minstu sóknini í økinum, hevur leingi verið í sjóneykuni sum ein av kirkjunum á Vesturbrúgv, sum ein kann vera fyri uttan, um ein tekur avgerð um at steingja ávísar kirkjur.

Nú ynskir kirkjuráðið við Gethsemane kirkjuna at gera okkurt við beinanvegin, og hevur sjósett eina visjonera ætlan fyri framtíðini.

- Vit vilja fegin verða ein kirkja, men vit vilja eisini verða ein lokkandi oasa fyri íbúgvarnar í býarpartinum, og sum ikki veru vanir við at koma til tær vanligu hámessurnar sunnudagar, sigur Erik B. Nielsen, formaður í kirkjuráðnum.

### Høgt støði

Aftanfyri arkitektakappingina stendur Center for Idræt og Arkitektur, ráðgevandi kirkjuligi felagsskapurin Kirkefondet og Bygningskultur Danmark.

Sambært Kaj Bollman, aðalskrivara í Kirkefondet, hava arkitektarnir fingið frítt spæl, um ein sær burtur frá tí veruleika at kirkjan skal framvegis brúkast til kirkjuligt virksemi.

- Við kappingini vóna vit, at fáa eina verkætlan á høgum støði, sum kann gerast ein fyrimynd fyri aðrar kirkjur í Danmark – ja, eitt gott dømi um, hvussu kirkjan kann møta fólki, har sum tey eru.

Center for Idræt og Arkitektur hevur millum annað hugt til eina kirkju í bretska høvuðsstaðnum London, har ein eisini hevur listaframsýningar, kvøldskúla, ballettundirvísing og enntá ein fitness-depil.

Artkitektakappingin verður samstundis sum Københavns Stiftsråd er í ferð við at kanna, hvussu sóknirnar skulu skipast í framtíðini. Sambært hesum skuldu ávísar kirkjur latast aftur, millum annað Gethsemane Kirke.

Júst tí er dómprósturin, Anders Gadegaard, sum er limur í Københavns Stiftsråd fegin um kappingina. Hann leggur dent á, at tað er týdningarmikið at kirkjurnar framvegis verða brúktar til kirkjuligt virksemi.

- Tað verður ikki talan um, at ein hópur av kirkjum brádliga verða umbygdar til fitness-deplar ella spælistøð, sigur hann.

# Dýrari at doyggja

**Raksturin av krematori'um í Danmark er vorðin so dýrur, at fleiri teirra helst fara at lata aftur**

DEYÐIN

*Snorri Brend*

**Danmark:** »En dyr affære«.

Tað kann deyðin gerast hjá teimum, ið framyvir ætla at verða brend í einum krematori'um.

- Kostnaðurin fyri hetta kann lættliga økjast til tað tvífalda í Aalborg – og kanska til tað trífalda í Hjørring, veit P4 í Norðurjyllandi at siga.

Økingin í rakstrinum fer møguliga at gera sítt til, at krematori'ið í Hjørring verður noytt at steingja.

- Verður hetta veruleikin verða tey deyðu, ið skulu brennast flutt til Aalborg, metir Alan Vest úr Hjørring sambært Kristelig Dagblad.

Hann er krematoriu-leiðari á hesum staði, sum er annað teirra í Norðurjyllandi.

### Gjalda sjálvi

Í dag kostar ein kremering í bæði Aalborg og Hjørring 1600 krónur, men sambært einum útspæli frá Kirkjumálaráðnum fer prísurin í Aalborg at hækka upp í 3500 krónur um nøkur fá ár, og í Hjørring heilt upp í 4500 krónur.

Orsøkin til stóra prísvøksturin er, at krematori'ini skulu reinsa roykin frá ovninum við filtrum frá 2010. Umframt hetta skulu tey gjalda aðrar útreiðslur, sum í dag verða goldnar annaðhvørt umvegis kommunuskattin ella kirkjuskattin.

Eitt lógaruppskot er júst vorðið útsett til komandi fólkatingsár, men hetta sissar kortini ikki Allan Vest.

Hann sær fyri sær eitt hálvt ár við óvissuni um, hvørji krematori'ir skulu rekast framyvir.



*Tað verður dýrari at verða brendur í donskum krematori'um í framtíðini*

- Fullkomið brúkaragjald fer at gera tað alt ov kostnaðarmikið at reka tey krematori'ini, sum hava fægstar kremeringar. Hetta fer ikki bert at ganga út yvir Hjørring, men eisini krematori'ir í Vesturjyllandi og í Høvuðsstaðarøkinum, har tey liggja rættiliga tøtt, sigur Allan Vest.

Umframt at vera leiðari á krematori'uminum í Hjørring er hann eisini formaður í DKL, Danske Krematoriers Landsforening.

## Brúktar fartelefonir til Tanzania

**Heimamissiónin:** - Hevur tú eina fartelefon, sum tú ikki hevur tørv á longur? Henda spurningin setir Havstein Klein, trúboðari í Tanzania føroyingum, nú hann ætlar at fáa fleiri brúktar fartelefonir til vega. Slíkar fartelefonir høvdu lætt munandi um arbeiðið hjá evangelistunum, sum ferðast runt í økinum, har Beinta og Havstein arbeiða. Ávísar treytir verða settar hesum fartelefonunum, millum annað at tær ikki eru læstar, ikki bundnar at eini ávísari telefonfyritøku og eru í hampiliga góðum standi. Tær kunnu latast til Heimamissiónina í Nesvík, sum síðani sendir tær víðari til Afrika.

## Eitt vikuskifti í lovsangi



**Í Skálafirði:** Í døgunum 17. til 20. apríl skipar samkoman Keldan fyri lovsangsráðstevnu undir heitinum: HEILAGUR ER HARRIN. Á ráðstevnuni verða seminar, workshops, møtir og konsertir. Høvuðstalari á ráðstevnuni verður Tom Inglis úr Avstralia (myndin).

## Baptistarnir økjast í tali

**Noreg:** Seinasta árið øktist talið av limum í Baptistsamfunnet við 500, og er í dag komið uppá 10.307. Fleiri nýggjar samkomur hava sæð dagsins ljós í farna árinum, samstundis sum aðrar hava snarað lykilin á seinasta sinni.